# Myllumenn egið hotell

Teir, sum skulu seta havvindmyllurnar upp á Horns Rev vestan fyri Esbjerg, hava nú fingið egið hotell at búgva í, og sjálvandi er talan um eitt flótandi hotell. Tað er ein gomul ferja hjá reiðarínum Stena Line, sum er umbygd til hotell, og sum hevur fingið navnið Wind Solution. Ein av eigarunum, Anders Østergaard, sigur við JydskeVestkysten, at hotellið er ein góð loysn, tí nú slepst undan at flyta fólk til lands og útaftur, og harvið ber til at spara nógva tíð. Hann vil ikki siga, hvat tað hevur kostað at keypa og umbyggja ferjuna. Wind Solution kemur til Esbjerg í morgin.



# Ísland handilsjavnaavlop

Íslendingar útfluttu í februar vørur fyri 32,3 milliardir íslendskar krónur, samstundis sum teir innfluttu vørur fyri 26,4 milliardir. Sostatt høvdu teir 5,9 milliardir íslendskar krónur í avlopi á handilsjavnanum í síðsta mánað, og tað er ein munandi bati samanborið við februar í 2008, tá handilsjavnin hevði meiri enn 18 milliardir íslendskar krónur í halli, um sama krónuvirði verður brúkt. Teir báðar fyrstu mánaðirnar í ár hevur Ísland útflutt vørur fyri 65,9 milliardir íslendskar krónur og innflutt vørur fyri 59,6 milliardir. Sostatt hevði landið 6,3 milliardir íslendskar krónur í avlopi á handilsjavnanum teir báðar fyrstu mánaðirnar.



*- Avleiðingin av, at fiskiloyvi verða handlað millum privatar er, at skuldin í fiskiskipavinnuni er vorðin alt ov stór, samstundis sum tey, ið hava selt, eru farin út úr vinnuni við pengunum, segði Tórbjørn Jacobsen í síni framløgu í Vestmanna*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Næstformaður Tjóðveldisins vísti á, at tá kvotuskipanin varð mett at vera ónýtilig, komu myndugleikar í Føroyum, fiskifrøðin og vinna at enda ásamt um eina fiskidagsskipan, sum í fyrsta lagi snúði seg um at fáa fiskiflotan útaftur.

### Fiskidagaskipanin

Tórbjørn segði í síni framløgu seg ivast í, um myndugleikar í Føroyum høvdu gjørt sær nakrar serligar konsekvensútrokningar um, hvør endin fór at verða, tá fiskiloyvini fóru at liva sítt egna lív, sum hann tók til.

– Onkusvegna hildu føroyingar seg vera á einum burðardyggum støði, tá fiskidagaskipanin varð sett á kjøl. Ætlanin við fiskidøgum var at regulera veiðitrýstið, soleiðis at sjálv stovnsrøktin kundi varðveitast.

Hann vísti soleiðis til tilmæli, sum Fiskirannsóknarstovan og Fiskidaganevndin sambært lógini um vinnuligan fiskiskap skulu lata landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, áðrenn nýggir fiskidagar verða ásettir á hvørjum ári.

– Fiskidagaskipanin virkaði eftir øllum at døma rímiliga væl, so leingi fiskastovnarnir vóru á veg uppeftir.

Løgtingsmaðurin ásannaði tó, at skipanin seinni hevur rent seg í trupulleikar, tá gingið er niður á bakka við fiskastovnunum, og at politiska skipanin ikki hevur verið nóg sterk til at hondterað hesa gongd, sum hann tók til.

– Tað eru nógv áhugamál, sum leggja trýst á politisku skipanina, tá avgerðir skulu takast, og tá hendir tað ferð eftir ferð, at fiskifrøðiligu tilráðingarnar ikki verða fylgdar nóg neyvt.

### Eingin toskur

Tórbjørn segði, at úrslitið av hesum er, at føroysk fiskiveiða hvat viðvíkur toski er komin í ein næstan líka so djúpan aldudal, sum hon var í fyrst í nítiárunum.

– Hetta er ikki nóg gott, tá havt verður í huga, at kurvar yvir búskaparligu gongdina í Føroyum eru "identiskar" við gongdina í føroysku toskaveiðini.

Hann segði, at fiskidagaskipanin ikki hevur megnað at hildið eini endurnýgging av toskastovninum uppi, soleiðis sum hon átti at gjørt – og varð ætlað at gera.

– Sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, skal fiskidagaskipanin vera búskaparliga og lívfrøðiliga burðardygg, men hetta er ikki tað, vit seinastu árini hava verið vitni til.

Tórbjørn vísti á, at føroyingar í 1996 fiskaðu heili 42.000 tons av toski í føroyskum sjógvi.

– Hinvegin hava fiskifrøðingar mett, at samlaði gýtingarstovnurin á toski í 2008 bert var 20.000 tons, samstundis sum samlaða toskaveiðan hetta árið einans var 8.000 tons.

Hann helt, at støðan hjá toskastovninum í føroyskum sjógvi aftur er farin at líkjast støðuni í Ný Foundlandi, hagar toskurin ongantíð er komin aftur.

– Og so er spurningurin, hvat vit sum politiskur myndugleiki mugu gera fyri at fáa fiskidagaskipanina, sum av ávísum politikarum hevur verið søgd at vera heimsins besta fiskiveiðiskipan, aftur á beint.

Tórbjørn Jacobsen vísti á, at líka mikið, hvat vit kundu hugsað okkum og ikki, verður neyðugt hjá okkum føroyingum at liva upp til krøvini um burðardygga veiði.

– Hetta eru krøv, sum heimurin, ið keypir okkara fiskavørur, setir, og gera vit ikki, sum altjóða samfelagið biðir okkum, sleppa vit í longdini heldur ikki av við okkara fiskavørur.

### Sítt egna lív

Løgtingsmaðurin segði, at síðan vit fingu fiskidagaskipanina í 1996 eru skip og loyvir handlað fyri meira enn 2 miljardir krónur.

– Fiskiloyvir eru handlað fyri okursprísir, og tey hava fingið sítt egna lív, sum hann tók til.

Og Tórbjørn legði aftrat:

– Avleiðingin er, at skuldin hjá nýggju eigarunum í fiskiskipavinnuni er vorðin alt ov stór, samstundis sum tey, ið hava selt, eru farin út úr vinnuni við pengunum.

Jú, størri skuldin er, jú størri skal veiðan verða – og jú størri veiðan er, tess harðari er ágangurin á okkara fiskastovnar. Hetta er eitt roknistykkið, sum ikki hongur saman.

Hann segði, at aðalmálið hjá okkum má vera, at vit hava eina so javna og støðuga fiskiveiði sum gjørligt.

– Vit kunnu siga, at fiskidagaskipanin í ein ávísan mun er destabiliserað av riknað fiskivinnupolitikkinum, har loyvi verða lutað út politiskt, eins og nýggj loyvi eru komin inn í skipanina. Politiska skipanin hevur ikki byrgt upp fyri teknisku menningini innan fiskiveiði, og soleiðis er veiðitrýstið økt, segði Tórbjørn Jacobsen.

### Tilfeingisbúðin

Sum nevnt í byrjanini, legði Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisins, í síni framløgu dent á tilfeingisbúðina, sum Tjóðveldi hevur skotið upp.

Vit hava valt ikki at taka hendan partin, sum eisini er rættiliga áhugaverdur og rúgvusmikil, við í blaðnum í dag, men í morgin í staðin.

Tá fara vit at lýsa uppskotið hjá Tjóðveldinum um tilfeingisbúð, sum Tórbjørn Jacobsen og Høgni Hoydal løgdu fram á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna mánamorgunin, gjølla.

Nakrir næmingar og onkur lærari settu eisini teimum báðum spurningar, sum vit eisini fara at venda aftur til í blaðnum í morgin.

Jákup Andreassen, skúlastjóri, nam eitt nú við spurningin, um tað er hugsandi, at kostnaðarmiklu fiskiloyvini, har privatir hava stungið miljónir fyri almenna ogn niður í lummarnar, kanska kunnu enda sum rokning til skattgjaldan – frá bankum, ið hava fíggja hesi keyp.

Framløgan í Vestmanna eydnaðist væl, og líkt var til, at bæði næmingar og lærarar fingu væl burtur úr.

EYSTURKOMMUNA

## Almenna móttøka

Fríggjadagin 3. apríl 2009 frá kl. 14.00 til 17.00

verður almenn móttøka í nýggju hølunum hjá Eysturkommunu, Landsvegur 2, við Gøtugjógv.

Búmerkið hjá Eysturkommunu verður avdúkað.

Øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið.

EYSTURKOMMUNA